FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 6. november 2020
J. nr.: 20/00490-2
Viðgjørt: AP

Svar upp á fyrispurning nr. 34/2020 eftir tingskipanini § 52a.

Fyrispurningur frá Bjørt Samuelsen, løgtingskvinnu, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um mvg-endurrindan til hitapumpur og elbilar.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at leingja skipanirnar við mvg-endurrindan til elriknar hitapumpuskipanir og til el- og vetnisbilar?
2. Umhugsar landsstýrismaðurin at víðka mvg-afturberingina til sólorku og aðrar eins góðar og góðkendar grønar hitaskipanir?
3. Um landsstýrismaðurin ikki ætlar at leingja mvg-afturberingina, hevur hann so aðrar ætlanir, sum kunnu eggja til og skunda undir, at húsarhald og vinna gera íløgu í grønar hitaskipanir, og leggja um til grøna orku til upphiting og flutning?

Svar til spurning 1
Ja.

Svar til spurning 2
Landsstýrismaðurin í orkumálum upplýsir, at arbeitt verður við at orða uppskot til orku- og veðurlagspolitikk fyri Føroyar, har sólorkuskipanir eru ein partur av "orkublandinum" fyri at røkka málinum um 100 % grøna orkuframleiðslu á landi í 2030. Umhvørvisstovan fyrireikar eina lýsing og greining av sólorkuskipanum, sum eitt nú kunnu setast upp á tekjur á vinnubygningum og sethúsum, og hvørjir avgjaldslættar kunnu umhugsast hesum viðvíkjandi, fyri at skunda undir orkuskiftið. Roknað verður við, at henda greining verður klár at leggja fyri landsstýrið í 2021. Møguliga verða aðrar orkuskipanir, ið byggja á varandi orkukeldur, eisini lýstar í sama viðfangi.

Svar til spurning 3
Víst verður til svarið í spurningi 1.

Tinganes, 6. november

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum